

# Sjóborg komið heim

**Jan Müller**

07.05.2014 - 11:52

Oljan.fo

Fyri fyrstu ferð síðani skipið varð bygt í Norra í 2012, er frálandaskipið Sjóborg hjá Skansi Offshore nú í Føroyum. Skipið kom á Runavík í morgun og ger nú klárt at taka útgerð til boripallin West Hercules, sum kemur í føroyskan sjógv ein av komandi døgunum. Sjóborg verður so ein av mongu føroysku veitarunum, sum skal hjálpa Statoil og partnarum at finna føroysku oljuna og gassið, sum eftir øllum at døma liggur goymt í undirgrundini.

Sjóborg fór beinleiðis av skipasmiðjuni í Norra á oljufeltið at arbeiða fyri Statoil, tá tað varð latið eigarunum í mars mánað 2012. Síðani hevur tað verið í chartur fyri Statoil og herfyri varð so avgjørt, at skipið skuldi vera veitingarskip hjá Statoil til tær báðar boringarnar í ár. Hesar eru mettar at vara í umleið eitt hálvt ár.

Við Sjóborg eru 24 føroyingar, sum arbeiða í tveimum skiftum. Teir gerast nú ein týðandi partur av áhugaverdu boringunum á landgrunninum í summar.

Sjóborg var triðja skipið í frálandaflotanum hjá Skansi Offshore. Fyrsta skipið var Eldborg, sum varð bygt í 2009 og sum í dag arbeiðir fyri Statoil í Eysturafrika.

Síðani kom Saeborg í 2011, Sjóborg og Tórsborg í 2012 og loksins Kongsborg í 2013.

Øll skipini eru bygd á Havyard skipasmiðjuni í Leirvík í Norra. Henda skipasmiðjan byggir í løtuni tvey frálandaskip til íslendskt reiðarí. Tað verður so byrjanin til íslendska frálandavinnu.